# NÁMSSKIPANs

# FYRI GASTRONOMATSTØÐARA- OG GASTRONOMÚTBÚGVINGINA

YRKIS depilin

1. august 2015

# INNIHALD

**TIL KAPITTUL 1 – ENDAMÁL VIÐ ÚTBÚGVINGINI ....... 4**

**TIL KAPITTUL 2 – ÚTBÚGVINGARTÍÐ, BYGNAÐUR OG INNIHALD ....... 4**

**TIL KAPITTUL 3 – FØRLEIKAMÁL VIÐ ÚTBÚGVINGARLOK ....... 10**

**TIL KAPITTUL 4 – EFTIRMETING EFTIR HVØRT SKÚLASKEIÐ ....... 10**

**TIL KAPITTUL 5 – SVEINAROYND ....... 10**

**NÁMSÆTLANIR TIL GASTRONOMATSTØÐARA- OG GASTRONOMÚTBÚGVING ....... 13**

BORÐREIÐING ....... 14
KOSTUR, ORKA OG FØÐSLA ....... 15
FYRSTAHJÁLP OG BRAND ....... 17
REINFØRI OG FRAMLEIÐSLUREINFØRI ....... 19
GRUNDTILGERÐ ....... 21
FØÐSLULÆRA 1 ....... 22
KUNDATÆNASTA ....... 23
KØKSSTARVSVENJING (+SKÚLAPRAKTIKK) ....... 24
FRAMLEIÐSLUÆTLAN – (MATGERÐ) ....... 25
MENTAN OG KUNDATÆNASTA (FØROYSK/FREMMAND) ....... 26
FRAMLEIÐSLUREINFØRI, SÍ EISINI FYLGISKJAL 4 ....... 27
UMHVØRVI ....... 28
SØLA OG TÆNASTA ....... 29
VØRUKUNNLEIKI ....... 30
KUNNINGARTØKNI ....... 31
MÁLTÍÐIN ....... 32
SENSORIK OG GÓÐSKA ....... 33
LÆRING, SAMSKIFTI OG SAMSTARV ....... 34
ROKNING OG KALKULATIÓN ....... 36
STARVSVENJING ....... 37
ÍVERKSETAN OG INNOVATIÓN ....... 39
ARBEIÐSUMHVØRVI ....... 40
NÁTTÚRUFAK Í SAMBANDI VIÐ FRAMLEIÐSLU ....... 41
VØRUKUNNLEIKI 2 ....... 42
VERTSKAPUR OG HEILDARFATAN ....... 43
YRKISRELATERAÐ ENSKT ....... 44
GASTRONOMISK INNOVATIÓN ....... 45
VØRUMENNING, FRAMLEIÐSLA OG TÆNASTA ....... 46
FØROYSK-FRONSK MENULÆRA ....... 47

TILRÆTTISLEGGING OG FRAMLEIÐSLA ... 48
VERKLIGUM ARBEIÐI Í KØKINUM ... 49
UPPLÆRING Á LÆRUPLÁSSI ... 50
DIÆTIKK ... 51
HEILSURØKT ... 52
NÁTTÚRUFAK ... 53

# Námsskipan fyri gastronomatstøðara og gastronom

<table>
<tr><td colspan="3">Námsskipan fyri gastronomatstøðara- og gastronomútbúgvingina, útgivin 1. august 2015<br>Yrkisnevndin hevur givið út sambært kunngerð nr. 21 frá 23. mars. 2015 um útbúgving til gastronomatstøðara og gastronom, sum broytt við kunngerð nr. 124 frá 21. august 2017.</td></tr>
<tr><td>Fyrisitingin hjá Yrkisnevndini</td><td colspan="2">Skúlin, sum bjóðar skúlagongdina í útbúgvingini:</td></tr>
<tr><td>Yrkisdepilin<br>Hoyvíksvegur 72<br>Postboks 9<br>110 Tórshavn<br>Telefon: 30 65 60<br>Telefaks: 30 65 64<br>www.yrkisdepilin.fo<br>yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo</td><td>TSK<br>Heygavegur 1A<br>Postboks 20<br>700 Klaksvík<br>Telefon: 45 63 11<br>Telefaks: 45 73 11<br>www.tsk.fo<br>runih@tsk.fo</td><td></td></tr>
<tr><td colspan="3">Til ber at venda sær til Yrkisdepilin og skúlarnar við spurningum um útbúgvingina og fyri at fáa meiri kunning um útbúgvingina.<br><br>Um ósamsvar er millum námsskipanina og útbúgvingarkunngerðina, so er tað altíð útbúgvingarkunngerðin, sum er galdandi!</td></tr>
</table>

## Til kapittul 1 – Endamál við útbúgvingini

Endamálið við útbúgvingini er ásett í § 2 í kunngerðini. Tørvur er ikki á at útgreina endamálið við útbúgvingini nærri.

## Til kapittul 2 – Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald

Skúlagongdin Útbúgvingin tekur 3 ár 7 mánaðir, og er lutað sundur í verkliga læru á góðkendum læruplássi og skúlagongd.

Skúlagongdin í útbúgvingini íroknað eitt sveinaroynd er 57 vikur. Skúlagongdin er býtt í fýra skúlaskeið. Fyri at halda fram á einum skúlaskeiði skal næmingurin hava staðið fyrra skúlaskeiði og fyri at sleppa til 3 og 4 skúlaskeið skal næmingurin umframt at hava staðið 2. skúlaskeið hava góðkendan lærusáttmálað.

Skúlagongdin verður skipað samsvarandi mynd 1.

**Mynd 1: Skipan av skúlagongd og longd á skúlaskeiðum**

| | Vikur |
|---|---|
| **Skúlaskeið** | |

| | |
|---|---|
| 1. skúlaskeið | 20 |
| 2. skúlaskeið | 20 |
| 3. skúlaskeið | 10 |
| 4. skúlaskeið | 7 |
| *Til samans* | *57* |

Møguligt er at byrja útbúgvingina við lærusáttmála ella uttan lærusáttmála. Um næmingurin byrjar útbúgvingina uttan lærusáttmála, byrjar útbúgvingin við skúlagongd. Ger næmingurin lærusáttmála meðan hann gongur í skúla, fær næmingurin alt skúlaskeiðið góðskrivað í lærutíðini.

Hjá næmingi, sum hevur lokið ein part av skúlagongdini í útbúgvingini, verður lærutíðin stytt samsvarandi loknu skúlagongdini.

Um næmingurin hevur arbeiðsroyndir ella aðra yrkisútbúgving, áðrenn hann byrjar í læru, kann næmingurin fáa lærutíðina stytta sambært meginreglu fyri stytting í lærusáttmála. Yrkisnevndin tekur avgerð um møguliga stytting av lærutíðini eftir umsókn frá sáttmálapørtunum.

Skúlagongdin í útbúgvingini fevnir um almennar lærugreinar, yrkislærugreinar og vallærugreinar. Í mynd 2 eru almennu lærugreinarnar og yrkislærugreinarnar endurgivnar.

**Mynd 2: Førleikamál, ið almennu lærugreinarnar og yrkislærugreinarnar styðja**

| **Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál.** Talmerkingin av førleikamálunum vísir til talmerkingina í útbúgvingarkunngerðini. | | | |
|---|---|---|---|
| **Almennar- og yrkislæru-greinar** | **Lærugreinaheiti** | **Avriksmát fyri lærugreinina** | **Vegleiðandi pultstímar, til saman** |
| 1. **skúlaskeið** | | | |
| 10 | Føroyskt | E | 72 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5, 16 | Náttúrufak | F | 72 |
| | Fyrstahjálp og brand | | 20 |
| | Reinføri | | 26 |
| | Kunningartøkni | | 53 |
| | Umhvørvi | | 26 |
| | Kostur, orka og føðsla | | 64 |
| | Vørukunnleiki | | 32 |
| | Grundtilgerð | | 26 |
| | Kundatænasta | | 38 |
| | Matmentan og kundatænasta | | 26 |
| | Sensorik og góðska | | 32 |
| | Framleiðsluætlan | | 112 |
| | Borðreiðing | | 54 |
| | Máltíðin | | 38 |
| | Eftirmeting | | 24 |
| Pultstímatal 1. skúlaskeið | | | 720 |
| **2. skúlaskeið** | | | |
| | Praktikk | | 360 |
| 6, 7, 8, 9, 10, 11, 12, 13 | Læring, samskifti og samstarv | | 36 |
| 7, 8, 9, 10, 11, 12, 13 | Søla og tænasta | F | 36 |
| 1, 2, 4,5, 12 | Føðslulæra 1 | Byrjunarstig | 18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 11 | Køksstarvsvenjing | Vanastig | 126 |
| 2, 3, 4, 7, 8 | Framleiðslureinføri | Vanastig | 36 |
| 3, 4, 8 | Rokning og kalkulatión | Vanastig | 36 |
| 1, 2, 3, 4, 5 | Vørukunnleiki 1 | Vanastig | 54 |
| | Valfak | | 18 |
| Pultstímatal 2. skúlaskeið | | | 720 |
| **3. og/ella 4. skúlaskeið** | | | |
| 3, 7, 8, 9, 11 ,12, 16, 19, 26, 30 | Íverksetan og innovatión | F | 36 |
| 2, 3, 4, 6, 7, 8, 16, 19, 20, 23, 24, 25, 27, 28, 29, 30 | Arbeiðsumhvørvi | Byrjunarstig | 18 |
| 1, 2, 3, 4, 8, 10, 11, 19, 24, 25, 26, 27, 28, 29, 30 | Náttúrufak í samband við framleiðslu | Byrjunarstig | 36 |
| 1, 2, 3, 4, 5, 10, 11, 17, 18, 19, 24, 26, 28, 29, 30 | Vørukunnleiki 2 | Framkomið stig | 36 |
| 3, 4, 6, 7, 8, 9, 12, 13, 14, 16 | Vertsskapur og heildarfatan | Byrjunarstig | 36 |
| 8, 10 , 12, 13 , 15 | Yrkisrelaterað enskt | Vanastig | 36 |
| 1, 2, 3, 5, 6, 7, 8, 10, 11 12, 26, 30 | Gastronomisk innovatión | Byrjunarstig | 36 |
| 1, 2, 3, 8, 11, 24, 26, 27 | Vørumenning. framleiðsla og tænasta | Byrjunarstig | 36 |
| 1, 2, 3, 4, 5, 13, 27, 29, 30 | Føroysk - Fronsk menulæra | Vanastig | 36 |
| 1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 11, 13, 16, 24, 25, 26 | Tilrættalegging og framleiðsla | Vanastig | 108 |
| 1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 8,9, 10, 11, 17, 24, 25, 26, 27 | Verkligt arbeiði í køkinum | Framkomið stig | 144 |
| | valfak | | 36 |
| Pultstímatal 3. og 4. skúlaskeið | | | 612 |
| **Tilsamans** | | | |

| Vallærugreinar | | | Vegleiðandi pultstímar, til samans |
|---|---|---|---|
| | | | |

Í myndini sæst hvat ella hvørji førleikamál í kunngerðini lærugreinarnar styðja og í hvørjum skúlaskeiði frálæran í ymisku lærugreinunum fer fram. Býti av lærugreinum millum skúlaskeiðini er vegleiðandi, og er lagt soleiðis til rættis at undirvísingin í mest møguligan mun styðjar verkliga partin av útbúgvingini. Skúlin ásetur møgulig førleikamál fyri hvørt skúlaskeiði sær.

Námsætlanirnar fyri einstaku lærugreinarnar síggjast í fylgiskjali xx til xx.

Almennu lærugreinarnar fevna um ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann almenna kunnleikan hjá næminginum og styðja undirvísingina í yrkislærugreinunum. Somuleiðis skulu almennu lærugreinirnarum, um tær eru á C- stigi ella hægri, fyrireika næmingin til framhaldandi útbúgving, og harvið styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan.

Yrkislærugreinarnar sermerkja læruna í matvøruútbúgvingini og skulu veita almennan kunnleika og fakligan yrkisførleika. Partar av yrkislærugreinunum eru serlærugreinar, ið eru á hægsta fakliga støði innan yrki og fata tær um verkliga og ástøðiliga undirvísing, sum skal miða ímóti at veita næminginum serligan yrkisførleika innan matvøruyrkið.

Avriksmátini fyri yrkislærugreinarnar eru í trimum stigum, so møguligt er at gera ein karm um lýsing, skjalprógvan og sýning av stigunum og framgongdini í undirvísingini í mun til uppgávurnar. Arbeitt verður á trimum stigum, ið vísa til torleikastigi í námsætlanunum: byrjanarstig, vanastig og framkomið stig:

*Byrjanarstig:* Næmingurin dugur at loysa eina uppgávu og arbeiða í vandum førum ella út frá einum kendum greiðsluevni ella hann dugur at gera torførari arbeiði við vegleiðing. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til at seta seg inn í grundleggjandi kunnleika- og hegnisøki í útbúgvingini, og førleikar til at menna ábyrgd og grundarlag til framhaldandi læring. Á byrjanarstigi skal sjálvstøði somuleiðis grundleggjast í samband við loysn av uppgávum.

*Vanastig:* Næmingurin dugur at tilrættarleggja og loysa eina uppgávu við vandum- ella kendum greiðsluevnum og umhvørvi, sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at seta seg inn í meiri torskild greiðsluevni og at samskifta við onnur um loysnirnar. Afturat hesum verður dentur lagdur á fleksibilitet og tillagingar evni.

*Framkomið stig:* Næmingurin dugur at meta um ein trupulleika, tilrættarleggja, loysa og fremja eina uppgávu ella at loysa ein trupulleika eisini í óvandum førum – einsamallur ella í samstarvið við onnur – við atliti til uppgávuna. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at taka ábyrgd og at sýna virkisanda til sjálvur at orða og loysa fakligar og sosialar uppgávur og trupulleikar. Afturat hesum verður dentur lagdur á tilvitan um góðsku og skapanarevni.

Vallærugreinarnar skulu miða eftir at nøkta áhugamál næmingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og at menna yrkis- og lestrarførleikan. Vallærugreinarnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum.

Mynd 3 endurgevur málini fyri verkliga partin av útbúgvingini. Í Myndini verður eisini víst á, hvat ella hvørji førleikamál í útbúgvingarkunngerðini einstøku málini styðja.

**Mynd 3: Førleikamál, ið verkliga læran styðjar**

| **Virksemið styðjar fylgjandi førleikamál.** Talmerkingin av førleikamálunum vísir til talmerkingina í útbúgvingarkunngerðini. | **Mál fyri verkligu læruna** |
|---|---|
| | Vørumóttøka (gastronomatstøðari) |
| | Grundtilgerð (gastronomatstøðari) |
| | Vørumóttøka (gastronom) |
| | Grundtilgerð (gastronom) |
| | Menu, tilrættalegging og økonomi (gastronom) |
| | Vertskapur og heildarfatan (gastronom) |

Fyri at náa førleikamálini fyri útbúgvingina skal læruplássi leggja verkligu læruna soleiðis til rættis at næmingurin í mest møguligan mun fær høvi til at arbeiða við uppgávunum, sum nevndar eru í mynd 3.

Vavi av arbeiðsuppgávum á læruplássinum kann tó hava við sær, at næmingurin ikki altíð sleppur at arbeiða við øllum uppgávunum í verkligu læruni, heldur ikki innan fyri eitt ávíst tíðarskeið. Tað er tó ábyrgdin hjá læruplássinum at tryggja eina so fjølbroytta læru sum gjørligt, møguliga við at næmingurin ein part av lærutíðini er hjá einum útisetavirki og arbeiðir við teimum uppgávum, sum læruplássi ikki arbeiðir við.

Fyri at fylgja lærutilgongdini hjá næminginum skal næmingurin í lærutíðini í minsta lagi til 3 samrøður við ábyrgdarpersónin á læruplássinum. Samrøðurnar taka støði í námsskipanini og sum endamál:

1. Samrøða I er ein samrøða, har næmingurin og læruplássi leggja fram sínar væntanir til útbúgvingartíðina. Samrøðan eigur at verða hildin áðrenn royndartíðin á 3 mánaðir er úti.
2. Samrøða II og III eru samrøður, har næmingurin og læruplássi taka saman um og eftirmeta útbúgvingar gongdina higartil.

## Til kapittul 3 – Førleikamál við útbúgvingarlok

Førleikamálini, sum næmingurin skal duga við lokna útbúgving eru ásett í §§ 5 og 16 í útbúgvingarkunngerðini. Tørvur er ikki á at útgreina førleikamálini nærri.

## Til kapittul 4 – Eftirmeting eftir hvørt skúlaskeið

Eftirmetingin av yrkislærugreinunum verður framd sambært námsskipan fyri einstøku yrkisútbúgvingina. Til eftirmetingina í 1., 2. og 3. skúlaskeiði eru avsettir 48 pultstímar tilsamans.

## Til kapittul 5 – Sveinaroynd

Sveinaroyndin varir 3 dagar og er skipað soleiðis:
1) Lærlingurin tekur eina verkætlanaruppgávu, sum hann ítøkiliga skal arbeiða við 2 dagar í skúlanum,
2) triðja dagin sýnir lærlingurin verkætlanina fram, og munnlig próvtøka verður í framhaldi av hesum.
Í sambandi við próvhoyring í verkætlanini verður eisini próvhoyrt í ymiskum táttum í yrkislærugreinunum.
Við støði í sýningini hevur lærlingurin eina framløgu, ið varir umleið 15 minuttir. Síðani verður lærlingurin próvhoyrdur í umleið 15 minuttir við støði í framløguni.
Fyri verkætlanina og próvhoyringina í verkætlanini verður givið 1 próvtal, ið verður ásett av tveimum metingardómarum og einum próvhoyrara.

Sveinaroyndin er staðin, um úrslitið av sveinaroyndini er í minsta lagi 02, vísandi til galdandi próvtalsstiga.

### Endaligt sveinaroyndarpróvtal

Í sveinaroyndini verður næmingurin mettur sambært niðanfyristandandi próvtalastiga

| Próvtal | Merking | Lýsing |
|---|---|---|
| 12 | Fyri framúr gott avrik | Próvtali 12 verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini. |
| 10 | Fyri sera gott avrik | Próvtali 10 verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini. |
| 7 | Fyri gott avrik | Próvtali 7 verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini. |
| 4 | Fyri hampiligt avrik | Próvtali 4 verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl. |
| 02 | Fyri toluligt avrik, sum kann verða góðtikið | Próvtali 02 verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini. |
| 00 | Fyri ikki nøktandi avrik | Próvtali 00 verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini. |
| -3 | Fyri heilt vánaligt avrik | Próvtali -3 verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. |

Tá ið liðugt er at próvdøma sveinaroyndina, skal oyðublaðið við endaligu próvtølunum fyri hvønn næming sær sendast til yrkisnevndina.

Yrkisnevndin útskrivar eftirfylgjandi næminginum sveinabræv, ið verður sent læruplássinum 2 – 3 vikur áðrenn lærutíðin hjá næminginum er liðug.

### Sjúkraprógtøka

Um næmingurin gerst sjúkur áðrenn ella meðan sveinaroyndin er og ikki er førur fyri at greiða úr hondum sveinaroyndina, ásetur skúlin eina sjúkraprógtøku skjótast gjørligt eftir at næmingurin er blivin frískur.

### Vegleiðing til næming, sum ikki stendur sveinaroyndina

### Kærumøguleikar

Um næmingurin metur at fremjanin ella dømingin av sveinaroyndini ikki er nøktandi, kann hann í seinasta lagi 8 dagar eftir at hann er gjørdur kunnigur við úrslitið av sveinaroyndini,

kæra málið til yrkisnevndina sbrt. kunngerð um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir. Kæran skal verða skrivlig og skal stílast til Yrkisdepilin, ið er fyrisiting hjá yrkisnevndini.

Í samband við kærumál um sveinaroynd skulu metingardómararnir geva eitt ummæli av teimum fakligu spurningunum í kæruni. Metingarskjøl sum eru útfylt á ein nøktandi hátt kunnu góðgera eina slíka frágreiðing.

.

# Námsætlanir til gastronomatstøðara- og gastronomútbúgving

**Fylgiskjal 1**

**Námsætlan í yrkislærugreinini**

## Borðreiðing

**Tímatal:**

54 pultstímar í 1. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir at borðreiða stakrættir, rættir til fleiri persónar og at borðreiða "kalt borð",
- lærir at servera rættir á rættan hátt, og
- at fyrireika og veita góða gesta- og kundatænastu.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

- Kann gera vanligar stakrættir,
- dugir at borðreiða,
- dugir at servera, og
- dugir at veita góða kundatænastu.

**Próvtøka / eftirmeting**:

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 2**

**Námsætlan í yrkislærugreinini**

## Kostur, orka og føðsla

**Tímatal:**

64 pultsímar í 1. skúlaskeiði.

**Lýsing: Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:**

- Í samband við eina einfalda matvøru- og mat- og máltíðarframleiðslu (svarandi til støði F í sundhed og naturfag) kann næmingurin samantvinna vitan um heilsuligu og náttúrufakligu eginleikarnar hjá matvørum og týdningin hjá hesum fyri tann einstaka, fyritøkur og samfelagið.
- (Næmingurin skal arbeiða við týdningin matvørum fyri heilsuna. Fokus vil verða á tey orkugevandi evnini (kolhydrat, feitt, protein og alkohol) og teir ymisku formarnir fyri orku, sum næmingurin brúkar í gerndisdegnum
- Harafturat arbeiðir næmingurin við smáum uppgávudømum og royndum, sum útinnast við vegleiðing)
- (Næmingurin lærir um týdningin av matvørum í mun til heilsu, og hvussu næmingurin brúkar einfaldar greiningarhættir til kanning av føðsluevnum í samband við tilvirkan av matvørum. Harafturat arbeiðir næmingurin við at føðsluútrokna og meta um úrslitið.)

**Førleikamál: Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur kann:**

1. greiða frá “energistofferne”
2. greiða frá “energiformer”
3. greiða frá einari vørulýsing
4. við vegleiðing, meta um týdningin av matvøru fyri heilsu
5. rokna út og greiða frá grundleggjandi evnafrøðiligum modellum
6. skjalprógva úrslit av arbeiðinum við náttúru- og heilsufakligum evnum
7. greina fyri uppbygnaðinum av “energistoffer” og týdningin fyri likamið
8. við royndum vísa á og rokna út ymisku “energiformer”
9. greina ymiskleika “nærings- og tilsætningstoffer” í matvørum og gera kostútrokning
10. meta um týdningin av matvøruni fyri heilsuna
11. arbeiða grundleggjandi evnafrøðiligum modellum og gera royndir í framleiðsluni av matvørum og drekkavørum
12. skjalprógva og miðla úrslit av arbeiðinum við náttúru- og heilsufakligum evnum

**Próvtøka / eftirmeting**: Tað verður givið støðumet og ársmet  í lærugreinini,

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

.

**Fylgiskjal 3**

**Námsætlan í yrkislærugreinini**

## Fyrstahjálp og brand

**Tímatal:**

20 pultstímar í 1. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við lærugreinini **fyrstuhjálp** er, at næmingur:*

- Er førur fyri at halda lív í ella fáa lív aftur í persón eftir vanlukku ella brádligari sjúku til bjargingarfólk ella lækni kemur á staðið,
- fáa prógv í fyrstuhjálp á byrjanarstigi.

*Endamálið við lærugreinini **eldsløkking** er, at næmingur:*

- Hevur kunnleika um, hvussu ein skal bera seg at, um eldur er í, og við einføldum hjálparmiðlum og -hættum at vera førur fyri at sløkkja smærri eldar og forða eldi í at breiða seg,
- fáa prógv í eldsløkking á byrjanarstigi.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini í fyrstuhjálp (leiðreglur hjá DFR) skal gera, at næmingur kann nýta:*

- Teir 4 høvuðshættirnar í fyrstuhjálp,
- stigvísa fyrstuhjálp til persón í óviti,
- fyrstuhjálp til bløðandi persón og persóni í sjokki,
- hevur skil fyri, hvussu persónur skal lyftast ella flytast,
- hevur skil fyri orsøkina til niðursettan andadrátt og orsøkina til sjokk,
- hevur skil fyri sálarligari fyrstuhjálp,
- hevur kunnleika um anatomiina í andaleiðini,
- hevur kunnleika um blóðrenslið og hvar lívgøgnini sita,
- hevur kunnleika um vanlukkur, sum kunnu føra til óvit ella sjokk, og
- hevur kunnleika um sjúkur, sum elva til óvit ella sjokk.

*Úrslitið av undirvísingini í **eldsløkking** (leiðreglur hjá BSF) skal gera, at næmingur:*

- Hevur kunnleika um eldástøði og grundleggjandi sløkkiástøði,
- dugir at sløkkja smærri eldar,
- hevur kunnleika um ávaringarmannagongdir,
- hevur skil fyri virknað og óvirknað eldtrygging, og
- hevur kunnleika um serligar eld- og spreingivágar (eldfiman løg, ravmagnseld).

Undirvíst verður í ***fyrstuhjálp*** samsvarandi leiðreglunum hjá ”Dansk Førstehjælpsråd” (DFR) og í ***eldsløkking*** samsvarandi leiðreglunum hjá ”Brand og sikringsteknisk Forum” (BSF). Lærari skal hava fullgilt ”instruktørprógv” fyri at kunna undirvísa í fyrstuhjálp og í eldsløkking og standa á listanum hjá ”Dansk Førstehjælpsråd”.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Í ***fyrstuhjálp*** fer próvtøkan fram samsvarandi reglunum hjá ”Dansk Førstehjælpsråd”

Í ***eldsløkking*** fer próvtøkan fram samsvarandi reglunum hjá ”Brand og sikringsteknisk Forum”.

**Fylgiskjal 4**

**Námsætlan í yrkislærugreinini**

## Reinføri og framleiðslureinføri

**Tímatal:**

1. skúlaskeið 26 pultstímar og 2. skúlaskeið 36 pultstímar

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir, hvørji krøvini eru til starvsøkið,
- lærir at gera eftirlitskema, sum skal skjalfesta innaneftirlit og at gera egineftirlit í tí
- handaliga arbeiðnum við herðslu á at halda galdandi reglur um reinføri, og
- lærir at meta um møgulig vandamál og hvussu ein skjalfestir arbeiðið við egineftirlit sambandi við framleiðsluna í køkinum - bæði undan, undir og eftir tilreiðingina av køldum og heitum rættum.
- fær kunnleika til grundleggjandi reinføri. Arbeiðir bæði við persónligum reinføri og framleiðslureinføri og skal við støði í undirvísingini kunna greiða frá ymsum viðurskiftum ið kunna ávirka reinførið.
- lærir millum annað um lógarásetingar í mun til persónligt reinføri og framleiðslureinføri, harundir grundleggjandi meginreglum fyri innaneftirlit. Roynd í matvørureinføri skal vera staðin

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

- Kann virka eftir lógarásettum krøvum, ið eru galdandi innan starvsøkið og í tí
- sambandi at hava ein virknan lut til at eyðmerkja vandamál og at fremja eftirlit, so sleppast kann undan óhepnum avleiðingum, og
- megnar at virka eftir serligum krøvum um reinføri, ið sett verða til frammanundan
- tilreiddar rættir og krøvini til goyming og pakking.
- skal kunna greiða frá á hvønn hátt alisfrøðiligu, lívfrøðiligu og evnafrøðiligu viðurskiftini kunnu ávirka reinføri og kunna greiða frá, hvønn leiklut ein sjálvur og kringumstøðurnar hava í tí sambandi,
- skal kunna greiða frá á hvønn hátt alisfrøðiligu, lívfrøðiligu og evnafrøðiligu viðurskiftini kunnu ávirka persónligt reinføri og kunna greiða frá, hvønn leiklut ein sjálvur og kringumstøðurnar hava í tí sambandi,

- skal kunna greiða frá á hvønn hátt alisfrøðiligu, lívfrøðiligu og evnafrøðiligu viðurskiftini kunnu ávirka framleiðslureinføri og kunna greiða frá, hvønn leiklut ein sjálvur og kringumstøðurnar hava í tí sambandi,
- skal kunna greiða frá teimum fysisku og sálarligu tørvunum, sum kroppurin hevur, og hvønn týdning reinføri hevur í tí sambandi,
- skal kunna greiða frá meginreglunum um innaneftirlit og matvørueftirlit, harafturat kunna fremja innaneftirlit í framleiðsluni
- skal kunna greiða frá viðkomandi lóggávu um reinføri.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal 5**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Grundtilgerð

**Tímatal:**

26 pultstímar í 1. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir um grundleggjandi matgerðar- og framleiðsluhættir, og
- lærir, hvussu ein er førur fyri at vísa sjálvstøðugt innaneftirlit við atliti at serligum krøvum.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

- Kann fyrireika og tilreiða vanligar heitar, flógvar og kaldar rættir frá nýfingnari ráváru og hagreiða rættirnar við røttum tilreiðingarhættum,
- kann flokka burturkast og skilja burturkast sambært galdandi umhvørvisreglum og sjálvbodnari flokking,
- dugir at halda útbúnað, maskinur og arbeiðsøkið reint,
- er førur fyri at virka samsvarandi reglunum um virkisins innaneftirlit,
- eftirfylgir lógarásettum krøvum innan vinnugreinina á ein virknan hátt,
- kann fremja arbeiðið ergonomiskt og trygdarliga rætt,
- kann arbeiða sjálstøðugt og í samstarvi við aðrar samstarvsfelagar, og
- sýnir nýhugsan og hug og evni at læra nýtt og at taka ábyrgd.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

.

**Fylgiskjal 6**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Føðslulæra 1

**Tímatal:**

18 pultsímar í 2. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir at framleiða léttar réttir samsvarandi ynski kundans um serframleiddan kost,
- lærir at arbeiða við samanseting av føðsluevnum so sum eggjahvítaevni, feitt, kulhydratir, vitaminir og miniralir, og
- lærir at gera útrokningar og at fáa grundleggjandi vitan um menniskjakroppin og um hvønn týdning føðsluevnini hava.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Skal kunna meta um vørulýsingar,
2. skal kunna framleiða lidnar réttir soleiðis, at føðsluevnini so vítt til ber verða varðveitt,
3. skal hava innlit í hvussu føðsluevnini broytast við tilreiðing og undir goymslu,
4. skal kunna framleiða léttar réttir samsvarandi ynski kundans um serframleiddan kost, og
5. skal kunna greiða frá, hvussu føðsluevnini ávirka kroppin.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal 7**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Kundatænasta

**Tímatal:**

1 skúlaskeið 38 pultstímar

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir, hvussu kundar og gestir skulu avgreiðast í ymsum tænastu- og søluhøpi, og
- lærir um vanligar søluhættir.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Skal kunna meta um rávørugóðsku og at tæna kundum og gestum í ymiskum tænastu- og søluhøpi,
2. skal kunna greiða frá vanligum distributiónshættum, herundir eisini í sambandi við innanhýsis og uttanhýsis samstarvsgongdir, og
3. skal kunna greiða frá og veita gestatænastu í sambandi við tænastuveitingar og tænastuhættir.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 8**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Køksstarvsvenjing (+skúlapraktikk)

**Tímatal:**

126 pultstímar í 2. skúlaskeiði. evt. skúlapraktikkin eisini.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir at nýta grundtilreiðingarhættir og vita, hvørjar rávørur eru egnaðar til teir ymsu tilreiðingarhættirnar,
- lærir um at gagnnýta og tilreiða rávørur rætt og at ráðleggja arbeiðið samsvarandi tíðar- og reinførisfyriskipanum,
- lærir at borðreiða ymsar rættir, bæði kaldar og heitar, føroyskar og útlendskar, og skilja millum teir ymsu tilreiðingarhættirnar, t.d. at undankóka, at kóka, at bleyttkóka, at pannusteikja, at ovnsteikja og at grillsteikja,
- lærir at gera suppir, sósir og soð og at nýta ymsar javningarhættir, og
- lærir, hvørjir tilreiðingarhættir eru best egnaðir til ta einstøku rávøruna.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Skal kunna hagreiða og tilreiða kaldar, flógvar og heitar rættir út frá røttum tilreiðingarhættum,
2. skal kunna borðreiða forrættir, høvuðsrættir og omanárættir við tilhoyrandi matevnum,
3. skal kunna ráðleggja og útinna arbeiðið við atlit at reglum um reinføri og føðslu-viðurskiftum,
4. skal kunna arbeiða eftir ergonomiskum grundreglum og ásettum trygdarfyriskipanum,
5. skal kunna arbeiða og framleiða í køki uttan at nýta óneyðugt av vatni, el og gassi,
6. kann reingerða, savna og viðgera burturkast eftir galdandi fyriskipanum, og
7. kann arbeiða sjálvstøðugt eins og í samstarvi við onnur.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreinini,

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 9**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Framleiðsluætlan – (matgerð)

**Tímatal:**

112 pultstímar í 1. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir at keypa inn,
- lærir at hagreiða rávørur, og
- lærir at seta saman og tilreiða lættar úrdráttir og rættir.

Næmingurin kann (við vegleiðing) keypa inn og hagreiða rávørur, samanseta og matgera/framleiða einfaldar úrdráttir, rættir/máltíðir og matarskráðir, harafturat nýta kunnleika til góðsku, kalkulatión, tíðarnýtslu, ergonomi og arbeiðsumhvørvi (Næmingurin lærir at keypa inn og framleiða rávørur, seta saman og tilvirka einfaldar rættir, máltíðir og matarskráir. Harafturat lærir næmingurin um, hvussu ein tilvirkar eina “ernæringsrigtig” samansetan av matarskránni til ymiskar málbólkar (kundar))

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Dugir at keypa inn,
2. dugir at hagreiða rávørur, og
3. dugir at seta saman og tilreiða lættar úrdráttir og rættir.
4. kann við vegleiðing fyrireika og seta saman og tilvirka einfaldar vørur, máltíðir og matarskráir, harafturat brúka kunnleika til góðsku, kalkulatión, tíðarnýtslu, ergonomi og arbeiðsumhvørvi

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 10**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Mentan og kundatænasta (Føroysk/fremmand)

**Tímatal:**

26 pultstímar í 1. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Fær eina breiða grundvitan um føroyska matmentan, herundir hvussu tilfeingið fæst til vega, hvussu tað fæst til høldar, hvussu tað verður hagreitt, hvørjir tilreiðingarhættir verða nýttir og hvussu tað kann goymast,
- lærir t.d. at lima krov, at skera upp hval, at royta fugl, at velta og annað av handaligum slag,
- fær eina breiða grundvitan um fremmanda matmentan og siðvenjir, og
- lærir at tilreiða rættir og at veita góða gesta- og kundatænastu við atliti at bæði
- føroyskari og útlendskari siðvenju.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Hevur kunnleika um føroyskt tilfeingi,
2. dugir at hagreiða, tilreiða og goyma vanligt føroyskt tilfeingi,
3. hevur kunnleika um fremmanda matmentan og siðvenju,
4. dugir at tilreiða og borðreiða læjttar rættir til fremmandafólk
5. dugir at veita fremandafólkum góða kundatænastu,
6. hevur kunnleika um hvussu vanligt føroyskt tilfengið fæst til vega, hvussu tað fæst til høldar, hvussu tað verður hagreitt, tilgjørt og goymt. Her undir hevur kunnleika til hvussu krov vera limað, hvussu hvalur verður skorin, fuglur royttur,
7. hevur kunnleika um hvat veksur og hvussu ymiskt verður velt í Føroyum
8. hevur eina breiða grundvitan um føroyska og útlendska matmentan og siðvenjir
9. dugir at tilgera og borðreiða lættar rætir til fremmandafólk, og
10. dugir at veita fremmandafólki góða kundatænastu

**Prógvtøka / eftirmeting:**

Prógvtøka í lærugreinini er partur av prógvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 11**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Framleiðslureinføri, sí eisini fylgiskjal 4

**Tímatal:**

36 pultstímar Í 2. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir um reinføri so at hann við støði í sínum fakliga kunnleika kann verða førur fyri at tryggja høgt reinføri í tí dagliga arbeiðnum, og
- lærir at hava ein virknan lut í reinførisspurningum.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Skal kunna greiða frá teimum fysisku og sálarligu tørvunum, sum kroppurin hevur, og hvønn týdning reinføri hevur í tí sambandi,
2. skal kunna greiða frá á hvønn hátt alisfrøðiligu, lívfrøðiligu og evnafrøðiligu tættirnir kunnu ávirka reinføri og kunna greiða frá, hvønn leiklut ein sjálvur og kringumstøðurnar hava í tí sambandi,
3. skal kunna greiða frá og handahóvs kunna nýta hættir og siðvenjur í sambandi við at halda gott framleiðslureinføri í tí handaliga arbeiðnum,
4. skal kunna greiða frá meginreglunum fyri egineftirlit og føðsluumsjón og at hava egineftirlit í arbeiðsstøðuni, og
5. skal kunna greiða frá viðkomandi lóggávu um reinføri.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal 12**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Umhvørvi

**Tímatal:**

1. skúlasekið 26 pultstímar

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Fær innlit í umhvørvisspurningar og fyritreytir til at skilja hugtøkini í umhvørvis-spurningum, sum vanliga verða nýtt í vinnulívinum og í samfelagnum,
- dugir at luttaka í orðaskiftinum um umhvørvi, bæði tá ið talan er um vinnulig og samfelagslig áhugamál, og
- fær eina vitan um, hvussu umhvørvisspurningar ávirka nær- og fjarumhvørvið.
- arbeiðir við hugtakinum "umhvørvi" í mun til arbeiðs- og privatlív. Arbeitt verður við samanspælinum ímillum umhvørvið og samfelagið sett í mun til framleiðslu, yrki og lívsgóðsku. Harafturat verður arbeitt við hugtakinum "Vistfrøði", tí vistfrøðiligu tankagongdini innan matvøruvinnigreinini og galdandi umhvørvislóg.

Í undirvísingini verður so vítt til ber tikið støði í vinnulívs- ella umhvørvisspurningum í mun til ítøkiligt framleiðslu- ella tænastuvirksemi til tess at greina og meta um tað árin, virksemið kann hava á náttúruviðurskifti. Undirvísingin skal fevna um umhvørvisspurningar í tí dagliga virkseminum, m.a. um hvussu rusk og annað verður skilt, um orkusparing og um hvussu mest fæst burtur úr tilfeinginum.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Kann skilja hvønn týdning umhvørvið hevur í vinnulívinum og í gerandisdegnum,
2. hevur innlit í samspælinum millum samfelagið og umhvørvið,
3. kann greiða frá grundleggjandi vistfrøðiligum hugsunarhættum og hugtøkum í sambandi við tilfeingis- og orkukervið í náttúruni, og
4. dugir at leita, velja og nýta týðandi upplýsingar um umhvørvi frá ymiskum keldum, eisini talgildað upplýsing.
5. fær innlit í spurningar har mannagongdirnar í framleiðsluni, atburður og lívsringrásin hjá vøruni hevur týdning fyri umhvørvi

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal 13**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Søla og tænasta

**Tímatal:**

36 pultstímar í 2. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Fær vitan um marknaðarføring,
- fær innlit í kappingarviðurskifti,
- fær kunnleika um keypilógina og brúkaraviðurskifti,
- lærir at gera lýsingartilfar og menukort, og
- lærir at røkja uppgávur í sambandi við keyp og sølu.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Kann samskifta munnliga og skrivliga um marknaðarføring,
2. dugir at nýta viðkomandi kt-amboð og -hjálpartól,
3. hevur grundleggjandi vitan um keypilógina,
4. kann greiða frá nær- og fjarumhvørvinum hjá fyritøkuni,
5. kann greiða frá menningini á sølu- og tænastuøkinum,
6. kann greiða frá hugsjónar- og endamálsgrundarlagnum hjá fyritøkuni,
7. kann greiða frá marknaðarbýtinum og valinum av móttakarabólki, og
8. kann greiða frá kappingarviðurskiftum.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 14**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Vørukunnleiki

**Tímatal:**

1 skúlaskeið 32 pultstímar - 2. skúlaskeið 54 pultstímar - 3. ella 4. skúlaskeið 36 pultstímar

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir at nýta rættar rávørur, rætt tilfar, rættar arbeiðshættir, rættan útbúnað og røtt amboð í sambandi við lættar arbeiðsuppgávur, og
- lærir at gera verkætlan í einum valfríum evni, sum bæði er ástøðilig og handalig.

Verkætlanin skal gerast sum ein framleiðsla í køkinum og leggjast fram fyri flokkin. Framleiðslan kann verða ein lýsing og ein framløga av einari fyritøku ella einari vøru. Meginparturin av næmingsins skúlatíð verður løgd til rættis sum skeiðundirvísing, annaðhvørt í ástøðishølum ella á verkstøðum. Harumframt verður ein partur av tímunum lagdir til rættis sum verkætlanartímar, har arbeitt verður við ymsum evnum, uppgávum og verkætlanum. Í sambandi við eina tvørfakliga verkætlan skal næmingur verða við til at umbiðja, keypa og móttaka vøru og læra um tær ymisku rávørurnar - dygd, uppruna og árstíðarslag og um goymingar- og tilreiðingarhættir.

Í køksvenjingini skal næmingur gera eina vøruumbøn. Vørurnar skulu verða árstíðarmerktar og kunna verða bæði vanligar ella vistfrøðiligar. Næmingur skal eisini eftirkanna vøru-umbønina og meta um dygdina á fingnu rávøruni og læra at reinsa og goyma vøruna á rættan hátt til hon verður nýtt.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

1. Skal kunna nýta rættar rávørur, rættar arbeiðshættir, rættan útbúnað og røtt amboð við atliti
2. at løttum og vællýstum arbeiðsuppgávum,
3. skal fáa til vega upplýsingar og kunning um viðkomandi rávørur, tilfar og framleiðslur,
4. skal kunna hagreiða og goyma rávørur og framleiðslur á rættan hátt,
5. skal kunna meta um rávørudygd, eisini vistfrøðiliga, sum verða nýttar á gistingarhúsum og matstovum, og tryggja, at vørurnar verða reinsaðar og goymdar á rættan hátt, og
6. skal kunna viðvirka í samband við innkeyp og bílegging av rávørum.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreinini

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 15**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Kunningartøkni

**Tímatal:** 53 tímar í 1. skúlaskeiði

**Lýsing:** Næmingurin lærir millum annað grundleggjandi funksjónir innan teksviðgerð og arbeiðir harumframt við talgildugum samskifti, rokniarki og lærir at leita eftir vitan á alnótini. Undirvísingin í KT kann partvís/lutvíst vera partur av fakunum “samskifti innan fakøki” og “kostur og orka/føðsla”

**Førleikamál:** Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:

1. kann brúka vanligar funksjónir í kunningartøki til tekst og talviðgerð, og skilja at gangnýta virðið av hesum KT-amboðum.
2. kann brúka tekstviðgerð (síðuuppsetan, marking, avrita og flyta tekst, forsniðan av teksti, seta inn grafik, innskjóting av teksti, tabulatorar, spaltur og punktuppsetan)
3. kann brúka rokniark (sjálvvirknar sumfunksjónir, formil/funksjón, forsniðan av sellum og avrita sellur/formil
4. skilur hugtøk og háttarløg, sum eru neyðug fyri at brúka teldur til at loysa uppgávur innanfyri málini í frálæruni
5. kann brúka talgilt samskifti og savna inn kunning á grundleggjandi støði.
6. kann brúka alnótina til at leita eftir upplýsing sum hevur týðing,
7. kann brúka eina teldupostskipan til samskifti (móttaka og senda teldupost, leggja afturat fílur v.m. )
8. kann gera eina teldutøka framløgu
9. kann greiða frá almennum krøvum til arbeiðsumhvørvi til innrætting og brúk av KT-arbeiðsplássum
10. kann greiða frá almenna brúkinum av KT í samfelagnum og innan yrkið, og eisini í mun til lívslanga førleikamenning
11. kann hugsa um hvørjar avleiðingar talgildu kunningartøkniligu menningin hevur fyri tann einstaka
12. skjalfesta og breiða út loysnir av trupulleikurm í samband við KT

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreininini

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 16**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Máltíðin

**Tíð:** 38 pultstímar í 1. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin kann við vegleiðing keypa inn og tilvirka rávørur, seta saman og tilvirka einkultar vørur, máltíðir og matarskráir við atliti til sensorik og góðsku.

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann við vegleiðing keypa inn og tilvirka rávørur, seta saman og tilvirka einkultar vørur, máltíðir og matarskráir við atliti til sensorik og góðsku.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreininini

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal 17**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Sensorik og góðska

**Tíð:** 32 pultstímar í 1. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin nýtir tey mest vanligu heiti til at lýsa mat, rávørur, sensoriska og kulinariska góðsku og lærir at døma um góðskuna á lidnari vøru útfrá farvu, skapi, tættleika og smakki.

**Førleikamál:**

1. Næmingurin nýtur tey mest vanligu heiti til at lýsa mat, rávørur, sensoriska og kulinariska góðsku

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreininini

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal 18**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Læring, samskifti og samstarv

Ískoyti til lærugreinina føroyskt á E-stigi í 1. skúlaskeiði

**Tíð:** 43 pultstímar í 2. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin kann greina/orða seg munnligt og skrivligt á føroyskum í starvs- og útbúgvingarhøpi svarandi til støðið E støðið í Føroyskum.

Næmingurin arbeiðir við samskifti í mun til ta útbúgvingarleið hann/hon hevur vant. Arbeitt verður við samskifti, bæði munnligt og skrivligt og næmingurin skal vísa, at hann/hon hevur skilt ymisk faklig hugtøk og málburð "fakúttrykk".

Næmingurin skal kunna greiða frá arbeiðsháttum "proces" og úrslitum, sum vera goymd í einari skjalamappu

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann (við vegleiðing) nýta skrivaða og talaða máli við atliti at mállæru svarandi til E-støði í føroyskum
2. Næmingurin kann samrøða/samskifta um egið skrivligt arbeiði, undir hesum evni til mappu
3. Næmingurin kann lesa og skilja einfaldan tekst
4. Næmingurin kann (við vegleiðing) greiða frá innihaldinum í einum teksti
5. Næmingurin kann (við vegleiðing) brúka lesi- og skriviætlanir
6. Næmingurin kann brúka KT til viðkomandi samskifti og til at leita eftir kunning
7. Næmingurin kann vera virkin í undirvísingini
8. Næmingurin kann, við tilvitan um mállæru og málsligar normar, herundir eina rímiliga nýtslu av siðsemi "korrekthed", brúka málið í skrift og talu
9. Næmingurin kann greiða frá og vera partur av samtalu um egið skrivligt arbeiði, herundir evnum til skjalamappu
10. Næmingurin kann vera greinandi í mun til innihaldi í teksti, boðskapi og framtíðarútlit
11. Næmingurin kann brúka lesi- og skrivistrategiir
12. Næmingurin kann brúka KT í samskifti og krevjandi leitan av kunning har tað er viðkomandi
13. Næmingurin kann brúka samskifti til gagns fyri samstarv og samveru við onnur
14. Næmingurin kann skilja og brúka vinnugreins-frøðimáli í samband við lesnað av teksit ið er yrkisrættaður

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet  í lærugreininini

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 19**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Rokning og kalkulatión

Framhald av støddfrøði á E-stigi frá 1. skúlaskeiði

**Tíð:** 36 pultstímar í 2. skúlaskeiði

**Lýsing:**
Næmingurin lærir at arbeiða við yrkisrættaðari støddfrøði í mun til gastronomyrki.

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann hegnisliga og við nýtslu av KT nýta útrokningarskipanina í yrki nýtur í sínum dagliga arbeiði, undir hesum rokna út vørur, tænastuavrik, køksprosentir og fylgja givnum útrokningum.
2. Næmingurin kann við at nýta KT rokna út rættir.
3. Næmingurin kann nýta kurs og valutarokning.

**Próvtøka / eftirmeting:**
Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreinini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 20**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Starvsvenjing

**Tíð:** 2x5 vikur í 2. skúlaskeiði.

**Lýsing:**

*Endamálið við starvsvenjingini í 2. skúlaskeiði er:*

At næmingur fær fatan av og innlit í matyrkið í tí praktiska gerandisdegnum sum heild og við serligum atliti at gastronom-atstøðarayrkinum.

Meginreglan fyri at kunna taka gastronom-atstøðisnæming í starvsvenjing í støðisárinum er, at stovnur ella fyritøka hevur fólk í starvi við útbúgving innan matyrkið. Minstakravið er hálvtannað ára útbúgving, t.d. gastronom-atstøðari,  o.l.

Stovnur ella fyritøka kann, um tað hevur fólk í starvi við í minsta lagi 10 ára viðkomandi starvsroyndum innan matyrkið, taka gastronomatstøðisnæming í starvsvenjing í støðisárinum.

Skúlin skipar fyri starvsvenjingini hjá næmingunum og tekur avgerð um, um ein stovnur ella fyritøka lýkur omanfyri nevndu krøv sum starvsvenjingarpláss. Góðkenning av stovni ella fyritøku sum starvsvenjingarpláss er galdandi fyri 1 ár í senn.

**Førleikamál:**

- Starvsvenjingarplássið skal tilrættaleggja starvsvenjingina hjá næmingi soleiðis, at tað stuðlar undir møguleikum næmingsins at røkka førleikamálini í útbúgvingini.
- Skúlin skal saman við starvsvenjingarplássinum gera eina upplæringarætlan fyri hvønn næming við atliti at uppgávum, ið starvsvenjingarplássið vanliga fremur og sum eru viðkomandi fyri útbúgvingina.

Næmingurin skal á byrjunarstigi kunna:

***Vørumóttøka***

1. góðskumeta rávørur, hálv og heilfabrikata við móttøku,
2. gera bílegging av vørum og innkeypi, harumframt gera meting av prísi og góðsku, og gera meting av lagrinum,
3. reingerða, gera klárt og skera út ymiskar rávørur, umframt kryddarí og “kolonial”,

***Grundleggjandi tilgerðarhættir***

4. brúka grundleggjandi tilgerðar hættir og gera “grundsupper” og “grundsaucer”, umframt “frokostretter”, kalt borð og “desserter,
5. gera klárt, tilgerða og servera a la carte, veitslur og buffét, umframt gera klárt bæði, føroyskar og útlenskar rættir, skal arbeiða fýsiskt rætt við tilgerðarhættunum,

***Tilrættalegging og rakstur***

6. tilrættaleggja egna og felags arbeiðsgongd og samstarva í køkinum, og
7. fyrihalda seg til dagliga virksemi í køkinum og fyritøkuni

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað er eingin próvtøka ella eftirmeting av starvsvenjingini.

**Fylgiskjal 21**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Íverksetan og innovatión

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

### Lýsing:

Næmingurin lærir at arbeiða við yrkisrættaðari íverksetan og innovatión í mun til gastronomyrki.

Stig: F

### Førleikamál:

1. Næmingurin fær kunnleika til íverksetan og innovatión og hugtakið at vera sjálvstøðugur
2. Næmingurin kann greiða frá hvussu tú setur á stovn eitt vikið, her til hoyrir hvussu eitt virkið dagliga verður rikið.
3. Næmingurin kann greiða frá ymiskum fyriskipanarligum meginreglum í fyritøkuni, aftur at hesum koma avgerðar mannagongdir og hvussu samstarva verður á ymiskum stigum.
4. Næmingurin fær innlit í føroyskan vinnustruktur og tess broytingar, til hetta hoyrir hvørja ávirkan altjóða viðurskifti hava á okkara viðurskiftið.

### Próvtøka / eftirmeting:

Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 22**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Arbeiðsumhvørvi

**Tíð:** 18 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin lærir at arbeiða við arbeiðsumhvørvi í mun til gastronomyrki.

Stig: Byrjunarstig

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann geva eitt íkast til at skapa tað best møguliga umhvørvið, m.a. við at luttaka og gjøgnumføra eina meting av arbeiðsplássinum.
2. Næmingurin kann bru´ka vitan um tað fysiska og psykiska arbeiðsumhvørvi og vera við til at geva og tilrættatleggja mannagongdir við tí endamálið at fyribyrgja tungum arbeiði.
3. Næmingurin kann arbiða út frá ásetingunum í arbeiðsumhvørvislógini.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 23**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Náttúrufak í sambandi við framleiðslu

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin lærir at arbeiða við náttúrufakinum í mun til framleiðsu í gastronomyrkinum.

Stig: Byrjunarstig

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann meta um og úttala seg um teir alis- og evnafrøðiligu mannagongdirnar, ið verða gjørdar í samband við tær framleiðsluhættir, ið verða nýttir í framleiðsluni.
2. Næmingurin kann arbeiða eksperimentelt við fakinum út frá eini náttúrufrøðiligari tankagongd

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet í lærugreinini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 24**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Vørukunnleiki 2

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin lærir at arbeiða við Vørukunnleika 2 í mun til framleiðsu í gastronomyrkinum.

Stig: Framkomi stig

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann góðskumeta tær rávørur, eisini vistfrøðiliga framleiðslu og hálv- og heilfabrikata, ið vera nýtt í hotel-, retaurant-, cafeteria-, kantinu- og café køkum, umframt at tað er røtt goymsla, reinsan og liðugtgerð
2. Næmingurin kan vera við til at gera innkeyp og bíleggingar av rávørum, umframt raðfesting og seta upp í mun til fíggjarviðurskifti, forbrúk og árstíð
3. Næmingurin kann greiða frá føðsluinnihaldinum í rávørunum, brúks umráðið, árstíð og góðsku.
4. Næmingurin kann nýta sensorik í mun til egnar arbeiðsuppgávur.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 25**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

# Vertskapur og heildarfatan

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

## Lýsing:

Næmingurin lærir at arbeiða við vertsskapi og heildarfatan í gastronomyrkinum.

Stig: Byrjunar stig

## Førleikamál:

1. Næmingurin kann lýsa eina framleiðslugongd í fyritøkuni og framleiðsluflow
2. Næmingurin hevur skil á egnum leikluti og týdninginum av sínum samstarvsfeløgum í dagliga arbeiðnum í fyritøkuni, útviklingin og lønsemi.
3. Næmingurin kan virka við til at gesturin følir seg vælkomnar og fær eitt gott upplivilsi.
4. Næmingurin kann samstarva við starvsfelagar annars í fyritøkuni við tí endamáli at geva gestunum tað teir ynskja og vænta.

## Próvtøka / eftirmeting:

Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 26**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Yrkisrelaterað enskt

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

### Lýsing:

Næmingurin lærir at arbeiða við yrkisrelateraðum enskum í gastronomyrkinum.

Stig: Vanastig

### Førleikamál:

1. Næmingurin kann lesa og skilja vanligar faktekstir í javnan koma fyri og hava yrkisligan týdning

### Próvtøka / eftirmeting:

Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 27**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Gastronomisk innovatión

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Nemingurin lærir at arbeiða við gastronomiskari innovatión í gastronomyrkinum.
Stig: Byrjunarstig
**Førleikamál:**

1. Nemingurin kann meta um og greiða frá um tær alisfrøðiligu- og evnafrøðiligu mannagongdirnar, ið ganga fyri seg i samband við tilgerðarhættir, ið verða nýttir í framleiðsluni.
2. Nemingurin kann arbeiða eksperimentelt við fakinum út frá eini náttúrufrøðiligari tankagongd
3. Nemingurin kann arbeiða innovativt við at útvikla nýggjar rættir.
4. Nemingurin kann nýta vanlig faklig heitið til at lýsa sensorisku góðskuna hjá rávøruni og máltíðini.
5. Nemingurin kann arbeiða við at menna og fagurgera smakki upplivilsi út frá eini sensoriskari vitan.
6. Nemingurin kann royna og menna nýggjar rættir við útgangsstøði í rávørum í eru bundar at árstíðum.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet í lærugreinini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 28**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Vørumenning, framleiðsla og tænasta

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

### Lýsing:

Næmingurin lærir at arbeiða við vørumenning, framleiðslu og tænastu í gastronomyrkinum.
Stig: Byrjunarstig

### Førleikamál:

1. Næmingurin kann nýta struktureðaðar teknikkir í samban við menning av vørum ella tænastum innan týðandi vinnuøkið.
2. Næmingurin kann greiða frá um tørv og faktorar, ið eru neyðugir fyri framleiðslumenning
3. Næmingurin kann nýta vitan um tann teknolisku menningina av einum ella fleiri úrdráttum
4. Næmingurin kann leggja til rættis og evna til eina ella fleiri úrdráttir sjálvstøðugt

### Próvtøka / eftirmeting:

Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 29**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Føroysk-fronsk menulæra

**Tíð:** 36 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**

Næmingurin lærir at arbeiða við føroysk - franskari menulæru í gastronomyrkinum.

Stig: Vanastig

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann leggja til rættis matsrkáir út frá føroyskum og fronskum mattraditiónum við at nýta føroyskar og franskar rávørur.
2. Næmingurin kann lesa og orða uppskriftir og leiðbeiningar.
3. Næmingurin kann seta saman skiftandi matskráir.
4. Næmingurin kann nýta faklig heiti á føroyskum og fronskum í kokkayrkinum.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet í lærugreinini

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 30**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Tilrættislegging og framleiðsla

**Tíð:** 108 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**
Næmingurin lærir at arbeiða við tilrættalegging og framleiðslu í gastronomyrkinum.
Stig: Vanastig

**Førleikamál:**

1. Næmingurin kann kreativt taka lut í menningini og endurnýggjan av øllum leiklutum í køkinum í mun til kaldar og heitar rættir.
2. Næmingurin kann gera klárt, fyrireika, borðreiða og rudda upp veitslu og à la carete matskráir til veitslur og buffeir umframt at nýta framleiðsluyvirskotið í mestan mun.
3. Næmingurin kann gera klárt, borðreiða og seta prís á rættir frá tí klassiska køkinum, føroyskum økisrættir og serrættir.
4. Næmingurin kann leggja til rættis og gera arbeiði við atliti at tíð, vørunýtslu, fígging, reinførisreglum og út frá einum føðsluligum sjónarhorni.
5. Næmingurin kann arbeiða ergonomiskt og undir røttum trygdarviðurskiftum.
6. Næmingurn kann gera køksarbeiðið uttan óneyðuga orkunýtslu
7. Næmingurin kann gea køksarbeiði eftir galdandi umhvørvisreglum.
8. Næmingurin kann seta í verk innsavning av ruski í samsvari við galdandi reglar og frívilligar skiljiskipanir.

**Próvtøka / eftirmeting:**
Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal 31**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Verkligum arbeiði í køkinum

**Tíð:** 144 pultstímar í 3. og/ella 4. skúlaskeiði

**Lýsing:**
Næmingurin lærir at arbeiða við tilrættalegging og framleiðslu í gastronomyrkinum.
Stig: Framkomið stig

**Førleikamál:**
1. Næmingurin kann gera klárt, fyrireika, borðreiða og seta virði/prís á rættir.
2. Næmingurin kann stýra og nýta allar matgerða við øllum grundleggjandi hættum
3. Næmingurin kann stýra og borðreiða klassiska rættir og samstundis vísa kreativitet
4. Næmingurin kann eftirlíka gestsins ynski um serrættir/(specialkost).
5. Næmingurin kennir og nýtir tey mest vanligu hugtøkini fyri at lýsa tað kulinariska sensorikkin og góðskuna í einum rætti ella eini rávøru, umframt innanhýsis samanhangir
6. Næmingurin kann leggja til rættis, seta saman og gera mat við útgangsstøði í
7. Næmingurin kann vera tilætlaður um egnan smakksans og nýta hesa vitan í mun til gestsins tørv og væntanir
8. Næmingurin kann leggja til rættis og gera arbeiði við atliti at tíð, vørunýtslu, fígging, reinførisreglum og út frá einum føðsluligum sjónarhorni.
9. Næmingurin kann arbeiða ergonomiskt og undir røttum trygdarviðurskiftum.
10. Næmingurn kann gera køksarbeiðið uttan óneyðuga orkunýtslu
11. Næmingurin kann seta í verk innsavning av ruski í samsvari við galdandi reglar og frívilligar skiljiskipanir.
12. Næmingurin kann arbeiða bæði sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur.
13. Næmingurin kann gera innaneftirlit.

**Próvtøka / eftirmeting:**
Tað verður givið støðumet í lærugreininini
Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.

**Fylgiskjal XXX**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Upplæring á læruplássi

**Tíð:**
6 mánaðir

**Lýsing:**
Endamálið við upplæringini á læruplássi er at veita næmingi ta til læruna tilhoyrandi verkligu og handaligu royndirnar, sum gera, at hann eftir loknað læru hevur fullgildan handaligan førleika innan yrkið sum gastronom-atstøðari.

**Førleikamál:**

- Læruplássið skal fremja upplæringina soleiðis, at tað saman við skúlaundirvísingini ger, at næmingur røkkur førleikamálini í útbúgvingini,
- Læruplássið skal hava eina upplæringarætlan fyri næmingin við atlit til teimum uppgávum, sum læruplássið vanliga hevur,
- Læruplássið skal tilrættaleggja upplæringina í mun til ta skúlaundirvísing, næmingur hevur fingið og soleiðis, at skúlaundirvísingin og upplæringin á læruplássinum so vítt til ber styðja hvørt annað,
- Læruplássið eigur at skipa upplæringina soleiðis, at næmingur fær uppgávur, sum vaksa í torleikastigi og fjøltætni og soleiðis, at næmingur við endan á lærutíðini røkkur tað útbúgvingarstig, sum sett verður til útbúgvingina.
- Læruplássið skal leggja áherðslu á, at næmingur skilir týdningin av krøvunum til t.d. umhvørvi, reinføri, persónliga trygd og trygd í sambandi við útbúnað v.m., og at lóggávan viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi verður hildin.

**Próvtøka / eftirmeting:**
Tað er eingin próvtøka ella eftirmeting av upplæringini á læruplássinum. Eftir at skúla-undirvísingin og upplæringin á læruplássinum er lokin, fer næmingur á skúlanum upp til sveinaroynd sum gastronom-atstøðari samsvarandi galdandi reglum í yrkisútbúgvingarlógini.

**Fylgiskjal XX**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Diætikk

**Tímatal:**

72 pultsímar

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Lærir um hvønn týdning føðsluevnini hava fyri menniskjakroppin,
- fær kunnleika um samanseting av røttum kosti sum liður í fyribyrging og sjúkraviðgerð,
- lærir um tilreiðing av diætkosti og at gera útrokningar av kosti og samanseting av kosti, og arbeiðir við evnum sum fiti, diabetes, sjúkrahúskostur, hjartavinarligur kostur og kostur við ymsum frábrigdum v.m.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

- Við vegleiðing kann tilreiða rættir til búfólk á dagstovnum, ellisheimum og sjúkrahúsum v.m.,
- við vegleiðing dugir at fara um búfólk og sjúklingar við ymiskum og serligum kosttørvi, og at duga at veita góða røkt og tænastu.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreinini,

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini,

**Fylgiskjal XX**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Heilsurøkt

**Tímatal:**

36 pultstímar

**Lýsing:**

*Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:*

- Fær eina heildarfatan av hugtakinum heilsa í einum vinnufakligum høpi bæði til egið gagn og sum íkast til eina jaliga samfelagsliga menning, og
- fremur handaligt og ástøðiligt arbeiði við støði í grundleggjandi meginreglum innan ymisk evni og við herðslu á evni, ið hava týdning fyri útbúgvingina og yrkisgreinina.

**Førleikamál:**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

- Kann greiða frá fysiskum, heilsufrøðiligum og føðsluligum sjónarmiðum, sum kunna bøta um heilsuna,
- kann greiða frá sambandinum millum mannaheilsu og samfelagsligu menningina, og
- kann skilja týdningin av fyribyrgjandi og heilsufremjandi átøkum og virka samsvarandi teimum.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanni.

**Fylgiskjal XX**

Námsætlan fyri yrkislærugreinina

## Náttúrufak

**Tímatal:** 72 pultstímar

**Lýsing:**

Endamálið við undirvísingini er, at næmingur:

- Fær innlit í náttúrufakliga grundarlagið innan tøkni, tøknifrøði og heilsu við atliti at økinum innan matyrkið, og
- fær fatan av náttúrufakliga týdninginum av tøknifrøðiligu menningini og tess ávirkan á menniskju, yrkið og samfelagið sum heild.

Nátturulærugreinin er sett saman av alisfrøði, evnafrøði, støddføði og møguliga lívfrøði. Støddfrøðin inngongur sum ein integreraður partur av undirvísingini við atliti at greining og lýsing av náttúrufyribrigdum og útrokningum. Ítøkiliga innihaldið í undirvísingini skal m.a. taka støði í, hvørji verulig náttúruevni eru partar av útbúgvingini og hvussu hesi ávirka yrkið, menniskju og samfelagið. Lærugreinin eigur at fevna um allar náttúrufakligar partar. Eisini eiga verkligar royndir í lærugreinini at hava ein týðandi leiklut í undirvísingini.

**Førleikamál**

*Úrslitið av undirvísingini eigur at verða, at næmingur:*

- Skal kunna velja út og nýta náttúrufaklig hugtøk og myndlar til at lýsa spurningar innan yrkislig og samfelagslig øki,
- skal kunna nýta støddfrøðiliga málisku og gera útrokningar í sambandi við náttúrufrøðilig fyribrigdi,
- kann gera rannsóknir, eygleiðingar og royndir,
- dugir at taka fyrilit fyri týdninginum av tøknifrøðiligu menningini og ávirkan tess á menniskju, yrkið og samfelagið,
- dugir at arbeiða eftir røttum trygdarreglum við atliti at útbúnaði og evnafrøðiligum tilfari,
- skal kunna troyta, velja og nýta náttúrufakliga kunning frá ymsum upplýsingarkeldum,
- dugir at nýta viðkomandi KT-útbúnað til útrokningar, skjalfestingar o.a., og
- sjálvstøðugt kunna skjalfesta og formidla úrslit av náttúrufakligum royndum.

**Próvtøka / eftirmeting:**

Tað verður givið støðumet og ársmet í lærugreinini,

Próvtøka í lærugreinini er partur av próvtøkuni í støðisverkætlanini.